Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting: 7. mars 2023
Mál nr.: 23/11840-16
Málsviðgjørt: HP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997, sum seinast broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 um viðbót til ávísar pensjónistar, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Í heitinum verður "v.fl." strikað.
§ 3… *Stk. 2*. Umframt ásetingina í stk. 1 er viðbótin treytað av, at virðið av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, og sum er partur av inntøkugrundarlagnum sambært § 6 a, ikki er omanfyri kr. 2.000 árliga.	**2.** Í § 3, stk. 2 verður "kr. 2.000" broytt til: "kr. 12.600"
	3. Í § 3 verður sum stk. 3 sett: "*Stk. 3*. Upphæddin í stk. 2 verður javnað sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar.

	Javnaða upphæddin verður lýst í kunngerð um áseting og javning av almannaveitingum.”
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 1. januar 2024.